# Sekundini vóru avgerðandi

*Tveir mans fingu í gjár heiðurstekin fyri at hava bjargað einum smádrongi frá at drukna á Havnarvág*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Frá vinstru, Høgni Mohr, Kjartan Festirstein, sum var tann, ið datt á sjógv og Hannus Petersen. Aftanfyri stendur Uni Arge.* **Mynd: Alan Brockie**

–Í eini støðu sum hesari, eru tað sekundini, sum eru avgerðandi.

Tað segði Uni Vestureið á politistøðini í Havn, í sambandi við at hann á samkomu á politistøðini í Havn hósdagin handaði Høgna Mohr og Hannus Petersen Ingbølsteypið fyri eitt avreksbragd, teir báðir framdu á Havnarvág í september í fjør.

Tað var beint eftir klokkan 16 tann 9. september í fjør, at ein smádrongur datt á sjógv úti á Argjum, beint niðanfyri Sosialin. Í skjølunum hjá løgregluni stendur, at á miðdegi hendan dagin vóru ímillum 16 og 22 metrar um sekundið av útsynningi. Hitin í sjónum var 9,8 stig og hitin í luftini var 11,6 stig.

Streymurin og tann nógvi vindurin tók skjótt dreingin langt út frá landi. Róp kom í úti á Argjum og eisini teir báðir Høgni Mohr og Hannus Petersen hoyrdu rópini og teir bóru skjótt at, teir fingu klæðini av sær og lupu á bláman. Teir svumu teir uml. 70 metrarnar út til drongin og fingu bjargað honum í land.

Uni Vestureið sigur, at tá ið alt er yvirstaðið í slíkum førum er einasta uppgávan hjá løgregluni bara at skráseta tað, sum fór fram. Men tað var skjótt, at Carnegie grunnurin helt, at her var talan um so stórt bragd, at teir báðir bjargingarmenninir áttu eina heiðursløn uppiborna. Og fyri tíð síðani fingu teir báðir 10.000 krónur í part frá Carnegie grunninum. Og nú hevur so eisini »Redningsmedaljeselskabet« gjørt av at vísa teimum báðum viðurkenning og í gjár fingu teir báðir Ingbølsteypið á lítlari samkomu á politistøðini.

Tað vóru fólk, sum vóru heiðrað fyri ymisk brøgd, sum longu í 1884 stovnaðu »Redningsmedaljeselskabet«. Teir stovnaðu felagsskapin við tí endamálið at heiðra fólk, sum høvdu sett lív og heilsu í vága fyri at bjarga øðrum úr neyð. Nú er Margretha Drotning verji hjá felagsskapinum.

Eitt skiftið var amtslæknin Kaj Ingbøl nevndarlimur í felagnum og tá ið hann doyði, læt hann tað, hann átti, til felagsskapin. Haðani stavar navnið á steypinum.

UniVestureið sigur, at tá ið á stendur, liggur tað djúpt í føroyingum at hjálpa, uttan at hugsa um seg sjálvar. Í hesum førinum vóru tað eisini mong, sum gjørdu sítt, men tað vóru serliga hesir báðir, sum settu lív í heilsu í vága fyri at bjarga dronginum. Men hertil má sigast, at drongurin var avbera róligur, skilagóður og tað gjørdi sítt til, at teir vóru førir fyri at bjarga honum.

Men tað at teir bóru so skjótt og væl at, ger, at vit nú kunnu minnast hetta sum eina gleðiliga hending, sigur Uni Vestureið.

# »Eg gekk mær mót’ havinum vestur«

*Á Jóansøku er ein forvitnislig framsýning um Jákup Dahl í Vágs Kirkju*

ÁKI BERTHOLDSEN

„Eg gekk mær mót’ havinum vestur«

Undir hesi regluni úr Tjaldurssanginum er ein sera forvitnislig framsýning um Jákup Dahl, próvst, latin upp í Vágs Kirkju.

Tað er Landsbókasavnið og Bókasavnið í Vági, sum standa fyri framsýningini, sum fyllir alla forkirkjuna og kapellið. Framsýning er opin bæði í dag og í morgin frá kl. 16-19.

Hetta er fyrstu fer at ein framsýning er um Jákup Dahl.

Martin Næs, Landsbókavørður, sigur, at í seinastuni hevur Landsbókasavnið fingið rættiliga nógv og fjølbroytt tilfar um Jákup Dahl frá ymsum fólkum í slekt hansara.

–Savnið, vit nú hava um Jákup Dahl, er eitt tað største, vit hava um ein einstakt fólk, sigur landsbókavørðurin.

Hann sigur, at framsýningin, sum nú er sett upp í Vági, er bara eitt lítið úrval av tí, sum Landsbókasavnið hevur, men hann heldur kortini, at tað er rættiliga umboðandi og lýsir væl hansara fjølbroytta virksemi, bæði sum stríðsmann fyri føroyska málinum, sum sálmaskald og sum lýsir tað stóra arbeiðið hann gjørdi fyri føroysku kirkjuna.

Martin Næs sigur, at at framsýning kom í lag í samband við hátíðarhaldið nú tað eru 1000 ár síðani at Føroyar vórðu kristnaðar.

– Vit hildu, at hetta var ein hóskandi máti hjá Landsbókasavninum at vera við í hesum hátíðarhaldinum.

Á framsýningini eru m.a. handrit til sálmar, og prædikur, bøkur, myndir.

Fleiri prædikur eru á føroyskum, sum var rættiliga sjáldsamt tá á døgum, allarfyrst í hesi øldini.

Og í hesum fullveldistíðum, kann til stuttleika leggjast afturat, at eitt handrit, sum er á framsýningini, er eitt bræv, sum føroyingar í Danmark sendu Politiken í 1903, har teir verja sjónarmiðini hjá Jóannes Bónda.

Men Politiken vildi ikki prenta tað.

Brævið, sum Jákup Dahl, hevur skrivað, endar soleiðis: »...Med disse bemærkninger tror vi at have tilstrækkeligt godtgjort, at beskyldningerne mod Jóannes Patursson og det færøske folk for danskerhad og danskerhån, bliver fuldstændigt ugrundede og vi håber derfor at den del af det danske folk, der vil forstå det færingernes arbejde og bestræbelser, ikke for fremtiden må fortolke hvert livstegn og hver fremadgående stræben, der viser sig på Færøerne, både på det materielle og det åndelige område, som et udslag af uvilje og fjendskab mod det danske folk«.

Hetta vísir okkum, at í hvussu so er fyri ein part, kann kjakið um fullveldið nú og tá, samanberast.



*Landsbókasavnið hevur fingið eitt umfatandi og fjølbroytt savn um kenda Jákup Dahl, Próvst. Eitt úrval av tilfarinum er at síggja á framsýning í Vágs Kirkju á Jóansøku*








# Útróðrarbátur úr aluminium

*Fyrsti størri aluminiumsbáturin, sum ætlaður er til útróður undir Føroyum, varð hefyri keyptur úr Noreg. Báturin er skrásettur á Strondum*

EDVARD JOENSEN

Tað livir eitt sindur við bryggjuna í Heygsstøð. Báturin rykkir í endarnar, og hann kennist eitt sindur leysur á floti.

Men hann er rættiliga góður at vera umborð á, og hann ber seg óvæntað væl í sjónum, sigur Sonni Johansen á Strondum, sum her fyri keypti 23 tonsaran Marionnu úr Noreg.

Teir hava verið ein túr og roynt bátin. Og hann er rættiliga góður at andøva við, sigur Sonni Johansen.

Marianna er 14 ára gamal aluminiums deksbátur, sum er yvirdekkaður allur sum hann er.

Marianna er útgjørd við nýggjari egningamaskinu, og teir hava 21.000 húkar hangandi umborð, sigur Sonni. Teir verða 5-6 mans við bátinum, sum fer at rógva út við línu alt árið. Báturin er bara riggaður til línu, og ikki er ætlanin at seta snellur í hann, sum er.

Dekkið er sera væl innrættað og rúmligt og arbeiðsligt. Báturin er yvirdekkaður, og tað er høgt millum dekkini, so ongum nýtist at ganga við ampa fyri at sláa seg í nakrastaðni.

Marianna hevur 290 hesta høvuðsmotor og 60 hesta ljósmotor, sum eru javngamlir við bátin. Á sløttum gongur hon einar tíggju míl.

Annars er hon væl innrættað, og er rættiliga væl hildin. Í teimum trimum, sera snøggu kømurnum umborð eru tvær koyggjur í hvørjum. Ikki er dúrkið so øgiliga rúmligt, men koyggjurnar eru góðar.

Messan er sera snøgg og útgjørd sum køkurin heima, greiðir Sonni Frá. Elektriska kabúss og eimhettu plagdi ikki at vera so vanligt at hava umborð á skipi.

Og meðan vit práta fer eitt avskræmiligt ýl um allan bátin. Tað er alarmurin í messuni, sum sigur frá, at nú kemur ov nógvur dampur úr ketlinum, sum Sonni setti út á, so blaðmaðurin kann fáa ein kaffimunn, nú hann vitjar.

Á brúnni er alt, sum hoyrir nútíðini til. Gps'arar, plottari, radari og so framvegis. Eisini hevur báturin stabiliseringstanga, sum man vera heldur óvanligt við so lítlum báti.

Marianna er komin í flotan í staðin fyri Nevið Reyða, sum Sonni Johansen átti. Nevið Reyða brann og sakk eystan fyri seinasta heyst.

Men eitt fiskiloyvi er ikki nokk til hendan bátin, metir Sonni, sum hevur ognað sær útróðrarbátin Havnatind úr Klaksvík, sum teir hava róð út við í vetur. Nú verður Havnatindur lagdur, og loyvi lagt aftrat tí hjá Nevinum Reyða, soleiðis, at meira verður til Marionnu.

Sonni Johansen sigur, at hann metti tað ikki vera ráðiligt at smíða nýggjan bát fyri Nevið Reyða. Tí er hesin keyptur úr Noreg.

Fíggingin er úr Realinum, men eigarin leggur ikki í at upplýsa prísin.

Δ



*Marianna er fyrsti útróðrarbáturin úr aluminium*

*( Mynd: Edvard Joensen)*

# Nýggjur brunnbátur á Strondum

*Alistøðirnar Gulin og Funningslaks hava stovnað felagið Víking, sum hevur keypt brunnbát við sama navni*



*Víkingur við bryggju á Strondum*

*( Mynd: Edvard Joensen)*

EDVARD JOENSEN

Víkingur er brunnbátur, sum felagið Víkingur hjá alistøðunum Gulanum og Funningslaksi hevur keypt úr Noreg.

Víkingur kom til Føroya fyrst í juni og hevur fingið onkrar smávegis umvælingar, sigur Kári Nielsen, stjóri í Funningslaksi.

Víkingur skal brúkast at flyta laks frá alibrúkunum hjá Gulanum og Funningslaksi til kryvjivirkið á Strondum, sum somu feløgini eiga. Alibrúkini, Víkingur skal røkja, liggja á Funningsfirði, Kaldbaksfirði og í Nólsoyarfirði.

Víkingur varð umbygdur til brunnbát í Noreg í 1995, og hann kostar seks milliónir, nú hann er keyptur til Føroya, sigur Kári Nielsen.

Kryvjivirkið, sum Gulin og Funningslaks eiga inni á Strondum, varð royndarkoyrt í vikuni.

Tá Sosialurin vitjaði á virkinum, gingu montørar allastaðni og skrúvaðu og riggaðu til. Fimtan tons av laksi, sum víkingur hevði ført, gingu í einum hyli uttan fyri og bíðaðu eftir at fáa ta æru at verða fyrstu fiskarnir, sum skuldu ígjøgnum linjuna á virkinum.

Kári Nielsen sigur, at tá virkið er farið rættiliga í gongd, vænta teir, at eini 30 fólk fara at arbeiða har í tveimum vaktum. Tað verður fyri tað mesta fólk av vestara armi á Skálafirði, væntar hann.

Kári Nielsen vil ikki siga nakað um fíggjarviðurskiftini á virkinum. Einasta hann vil upplýsa er, at onkur útlendskur partaeigari er við.


